# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Føroyar eru nú ikki Italia ella Frakland!*
*Karel Brückner, landsliðsvenjari*

# Hava skotið 10 met

**Nikkel Petersen og Magnus Andreasen hava sett ikki færri enn 10 nýggj met fyrstu tveir dagarnar í junior-HM. Metini eru sett á teimum fýra frástøðunum umframt í samlaðu skoruni**

BOGASKJÓTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Magnus Andreasen hevur skotið framúr væl, og nú farið verður undir head-to-head partin er han styrkismettur sum nummar 23*
*Mynd: www.archery-fo.net*

Talan hevur verið um satt plettskot, nú Nikkel Petersen og Magnus Andreasen taka lut í junior-HM í bogaskjóting, har teir báðir skjóta compound.

Føroyska úttøkukravið var, at skjótast skuldi til eitt 32. pláss við seinasta HM, og tí skuldu góðar vónir verið fyri føroysku skjúttunum, um teir skutu upp til sítt besta.

Og tað kann mann soleiðis hampuliga róliga siga, at teir báðir hava gjørt.

Longu fyrsta kappingardagin í Turkalandi skoladu nýggj met yvir føroyska ferðalagið.

Nikkel skeyt tá á 90 og 70 metrum, meðan Magnus í cadet-bólkinum skeyt á 70 og 60 metrum. Og báðir føroysku skjúttarnir skutu seg til føroysk met á teinunum. Hjá Nikkel sá annars einki út eftir fyrstu trý umførini á 70 metrum, men við nøkrum sera góðum umførum togaði hann seg upp á 313 stig.

Og annan kappingardagin gekk eisini upp á stás. Skotið varð her á 50 og 30 metrum. Í báðum førunum skutu føroyingarnir seg eisini til met, og tí hava tær í fyrsta heilta FITA-umfarinum skotið met á øllum fýra teinunum umframt at samlaða skoran fyri fult FITA-umfar sjálvandi eisini er føroyskt met.

Vert er eisini at bíta merki í, at Magnus hevði nøkur framúr umfør á 50 og 30 metrum. Á 50 metrum var hann bert fýra stig frá 10-ára gamla føroyska metinum fyri vaksin, og á 30 metrum skeyt hann bert eitt stig undir metinum fyri vaksin. 30-meturin hjá Magnusi var eisini tann 10. besti í allari kappingini.

Talan er tó um knallharða kapping, sum teir báðir eru í. Í dag verður skotið head-to-head millum 64 teir bestu skjúttarnar. Her verða skjúttarnir seedaðir, soleiðis at nummar 1 skjýtur móti nummar 64, nummar 2 móti 63 o.s.fr.

Nikkel endaði sum nummar 45 í sínum bólki, og tí skal hann skjóta móti nummar 20. Magnus gjørdist nummar 23, og tí skal hann skjóta móti skjúttanum, sum gjørdist nummar 48.

## FAKTA

**Metini**

| **Skjútti/metrar** | **90** | **70** | **50** | **30** | **Samlað** |
|---|---|---|---|---|---|
| Nikkel Petersen | 306 | 313 | 332 | 346 | 1297 |
| | **70** | **60** | **50** | **30** | **Samlað** |
| Magnus Andreasen | 324 | 329 | 335 | 354 | 1342 |

# Endurtaka ikki franska mistakið

**Eysturríkski hópurin kemur til Føroya í dag - tveir dagar undan dystinum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Thierry Henry og liðfelagar hansara ásannaðu í fjør, at tað vera nakað buldrut at flúgva yvir Sørvágsfjørð*

Eysturríki vil tryggja sær eina optimala fyrireiking til HM-undankappingardystin ímóti Føroyum á Tórsvølli leygardagin. Eysturríkskir fjølmiðlar hava skrivað um franska landsliðið, sum royndi at lenda tvær ferðir í Føroyum, og eftir fyrru royndina máttu "Les Bleus" flúgva til Noregs ta ferðina.

Tá fraklendingar royndu at lenda á øðrum sinni eydnaðist tað við neyð og deyð.

Thierry Henry var eisini skelkaður, tá Eurosport vísti honum sjónvarpsupptøkur av ófantaligu lendingini. Slíkt vil eysturríkski hópurin tryggjar sær ímóti, og koma teir tí til Føroya í morgin tveir dagar undan HM-undankappingardystinum. Eysturríkski landsliðsspælarin, Marc Janko hevur hugt eftir dystunum hjá Føroyum ímóti Serbia og Rumenia á DVD, og hann sigur, at føroyska landsliðið stendur á vøllinum sum eitt hondbóltslið.

# Brückner vil hava eitt skjótt mál

**Tað ljóðar, at eysturríkski landsliðsvenjarin ætlar at spæla við trimum áleyparum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Eysturríksk fjølmiðlafólk bera uppá mál, at føroyska landsliðið hevur eina fleksibla "10-0-0" spæliskipan, har allir á liðnum verja. Venjarin hjá Eysturríki, kekkiski Karel Brückner hevur eina sera einfalda uppskrift yvirfyri eysturríksku fjølmiðlunum, um hvussu føroyska liðið skal knekkast.

- Pressa, pressa, pressa, fáa eina skjóta leiðslu.

Hesi vóru einføldu, men greiðu boðini hjá Karel Brückner. Brückner hevur skrivað sær aftanfyri oyra, at Rumenia uttan nakra serliga eydnu royndi at spæla seg gjøgnum miðverjuna hjá føroyska liðnum. Tí liggur tað í kortunum, at eysturríkska liðið fer at royna at spjaða spælið meir út á vengurnar. Eysturríkska liðið plagar vanliga ikki at spæla við trimum áleyparum, men tað er væntandi, at Brückner setur tríggjar áleyparar á liðið leygardagin. Tí, sum Karel Brückner sjálvur sigur.

- Men, Føroyar eru nú ikki Italia ella Frakland!.